FØROYA HANDILSSKÚLI

# Lærara í forritan og tøkni

## til teldustøðingaútbúgvingina



Um teldustøðingaútbúgvingina
Teldustøðingaútbúgvingin er styttri framhaldsútbúgving, ið tekur 2½ ár. Útbúgvingin fevnir í høvuðsheitum um systemmenning, forritan, tøkni og virki. Kjarnuøkini eru systemmenning og forritan; tøkni og virki eru ætlað at stuðla undir kjarnuøkini. Umframt hetta eru seinast í útbúgvingini sergrein, praktikk og høvuðsuppgáva. Neyvari kunning um útbúgvingina er á heimasíðu skúlans: www.fh.fo.

**Arbeiðsuppgávur tínar eru m.a. at:**
- undirvísa í viðkomandi lærugreinum innan forritan og tøkni (eitt nú softwarearkitektur og distribueraðar skipanir)
- leggja til rættis undirvísingargongdir, verkætlanir og próvtøkur
- leggja til rættis fakliga innihaldið í útbúgvingini í samstarvi við undirvísarar á útbúgvingini og leiðslu skúlans
- luttaka í ráðlegging og verkætlanum á skúlanum

**Vit vænta, at tú:**
- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving, ið gevur førleikar at undirvísa teldustøðingum
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva og samskifta
- vilt vera við til at menna útbúgvingina og skúlan
- dámar at taka við nýggjum avbjóðingum

Tað er fyrimunur, men ikki ein treyt, at umsøkjarin hevur royndir við líknandi undirvísing.

Lesandi, sum eru um at vera liðug við útbúgving sína, eru eisini vælkomin at søkja.

**Vit kunnu m.a. bjóða:**
- eitt fakliga mennandi undirvísingarumhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og gevandi gerandisdag

**Setanartreytir:**
Starvið er tíðaravmarkað og verður sett eitt ár í senn. Talan er um parttíðarstarv, setanarbrøkur verður avtalað við tann ella tey, sum sett verða. Starvsstaður er Handilsskúlin í Tórshavn. Lærarar á teldustøðingaútbúgvingini verða løntir sambært galdandi sáttmála.

Starvið verður sett skjótast til ber og í seinasta lagi 1. august 2011, um ikki onnur avtalað verður gjørd.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum vera at senda Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegi 77, Postsmogu 177, 110 Tórshavn. Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 14. juni 2011.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Ainu L. Knudsen á telduposti alk@hsh.fo.

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tlf 317177
Fax 313374
www.fh.fo





# Sethúsaognin Láarvegur 13, 100 Tórshavn er til sølu um hóskandi boð fæst

Húsini eru í 3 hæddum við lofti, miðhædd og kjallara.
Samlað búvídd er 330 m2.
Á loftinum eru køkur, stova og spísistova.
Í miðhæddini er durur, vaskirúm, hjallur, gongd, seymirúm, hjúnarúm við baðiverilsi, 2 kømur, baðiverilsi.
Í kjallaranum er gongd, køkur, stova, baðiverilsi, klædnarúm, 2 kømur.
Garaga og fiskarúm hoyra eisini til ognina.
Grundøkið er 451m2.
Húsini eru bygd í 1986.
Húsini hava sera gott útsýni og standa í friðarligum umhvørvi.
Myndir av ognini eru at síggja á heimasíðu okkara www.lawfirm.fo

Áhugað kunnu venda sær til Jógvan Páll Lassen, adv., jpl@lawfirm.fo ella Tórunn D. Lassen, skrivara, tdl@lawfirm.fo

Sosialurin 341800

**ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4**
YVIRI VIÐ STROND 4
100 TÓRSHAVN
TLF. 203040, FAX. 203041
E-MAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR



## Bilur til sølu

Peugeot 307 SW Griffe 2,0i Aut. Bilurin hevur leðursetur, Aut. Gear. Glastak, dub, klimaanlegg O.M.A. Bilurin er í sera góðum standi, og sær út sum nýggjur, bæði innan og uttan.

**Bilurin verður seldur fyri kr. 200.000,-**

*Fleiri myndir at síggja á TORG.FO*

**Áhuga kunnu ringja 56 62 35**


## ÁRSFUNDUR

hjá Kvinnufelaga-Samskipan Føroya verður á Toftum, Toftavegur 20 leygardagin 28. mai 2011.

Smyril siglur av Tvøroyri kl. 9.30 og frá Tórshavn aftur kl. 21.00.

Fundarskrá verður sambært lógum felagsins.

Uppskot til viðgerðar á fundinum skulu sendast til KSF, Postbox 1013, 110 Tórshavn ella til ksf@kvinnufelag.fo í seinasta lagi 20. mai 2011.

Fundurin verður settur kl. 12.30 í húsunum hjá Toftakvinnufelag.

**Tær, ið ætla at vera við, skulu siga frá í seinasta lagi 25. mai á telefon:**
Annetta Saltá
26 42 82
Jancy Olsen
21 75 38




Altjóða tubbaksfríi dagurin, 31. mai, verður í ár um evnið:
***Samstarv í øllum heiminum um at fólk ikki skulu roykja.***

Í sambandi við dagin skipar Fólkaheilsuráðið fyri eini teknikapping fyri børn og ung í hesum aldursbólkum:

a. Børn yngri enn 7 ár
b. 7-10 ár
c. 11-14 ár

Ein vinnari verður kosin í hvørjum aldursbólki, og fær hvør vinnari kr. 500 í virðisløn.

- Støddin á tekningunum skal vera 10x10 cm – ikki minni ella størri
- Boðskapurin í tekningini skal vera at eggja roykjarum til at halda uppat at roykja ella at halda ungum frá at byrja:
  1) Hvussu kann allur heimurin arbeiða saman um at gerast roykfríur
  2) Hvussu kunnu børn og ung siga »nei« til sigarettir
  3) Passiv royking rakar tey, ið ikki roykja
  4) Tað er »kul« ikki at roykja
  5) Royking er heilsuskaðilig
  6) At keypa sigarettir er at spilla burtur pengar

Børnini kunnu frítt velja, hvussu tekningin skal síggja út.

**Skrivið navn, føðingardag og telefon við blýanti aftanfyri á tekningini**

Tekningarnar skulu vera Fólkaheilsuráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. mai kl. 12.

**Tekningarnar skulu sendast til:**
***Fólkaheilsuráðið***
***J.C. Svabos gøta 43***
***100 Tórshavn***

Fólkaheilsuráðið
The Faroese board of public health


# Illur???

Sig tína meining í Sosialinum

